Røktar- og umlættingarheimið

# Lágargarður

## Starvsfólk til dagstovnin á Lágargarði

Lýst verður eftir fólki til dagstovnin á Lágargarði við serligum áhuga og hegni innan handaverk, og við førleika innan aktivering, at byrja skjótast til ber.

Talan er um eitt fast starv 40 t/vikuna og eitt farloyvisstarv 27 t/vikuna til 31. juli 2009.

Á dagstovninum koma 36 heimabúgvandi pensionistar um vikuna saman við búfólkunum, ið eru 48 í tali, sum fáa tilboð um bæði ítriv og venjing.

Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss í menning, har dentur verður lagdur á førleikamenning, arbeiðsgleði og trivna.

Starvsfólkum stendur eisini í boði at nýta venjingarhøli okkara í fysioterapiini í frítíðini.

Væntað verður, at umsøkjarir hava hug at arbeiða við eldi fólki, hava góð samstarvsevnir og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Áhugað eru vælkomin at ringja á tlf. 31 67 88 og spyrja eftir Marjun Poulsen, setta leiðara á dagstovninum, at vita nærri um størvini.

Umsókn til størvini við møgligum prógvum skulu sendast til:

Lágargarð
att. Meta av Fløtum, leiðara
Stoffalág 84
Postboks 1188
FO-110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist: 26. januar 2009.**

# Kunningarskriv

Porkeris- og Vágs kommuna hava avgjørt at seta sína egnu Barnaverndartænastu á stovn, ið kemur at liggja undir Sosialu deild hjá Porkeris og Vágs Kommunu, ið húsast á kommunuskrivstovuni í Porkeri.

**Avgreiðslutíðirnar eru hesar:**

mánadag- tórsdag:.............9-12 & 13-16
onsdag:......................................... 13-18
fríggjadag ....................................... 9-13

Aðrar tíðir svarar vakttelefonin hjá barnaverndartænastuni á tlf. nr. 22 67 15.

**Suðuroyar Sunnara Barnaverndartænasta**
Við Á 8 950 Porkeri
Tlf 37 36 04- Tlf. 22 67 15
T-post: sosialadeild@email.fo

**Dagstovnin á Argjum**
Traðagøta 55 · 160 Argir

# Pedagogar

## til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir pedagogum bæði til vøggustovu og barnagarð at byrja 1. mars 2009 ella eftir nærri avtalu.

Møguleikar eru eisini fyri at kunna arbeiða niðursetta tíð.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019. Kunning er eisini á heimasíðu okkara www.dstargir.fo

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argir, og vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 30. januar 2009.

Sp/f. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

# ZARTEC.NET

**Timburarbeiði**

Bilur tín verður
# sum nýggjur

Vit gera smáskaðar, polera, bona og lakkforsegla bil tín við Nano Cover

Quick Repair

Á Hjalla · tlf. 21 33 23



# Eystur Kommuna

## Pedagogur søkist til Frítíðarskúlan í Gøtu

**Frítíðarskúlin søkir eftir** 1 pedagogi á 20 t. viku, at byrja 1. februar. (arbeiðstíðirnar eru seinnapartin)

Starvið í Frítíðarskúlanum er tíðaravmarkað frá 01. 02. 09 – 30. 06. 09

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum umhvørvi, nær við spælipláss og sandin, í Syðrugøtu.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum

**Vit ynskja av tær :**
- at tú er álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag
- at tú vilt vera við at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og fylgir lønarstigunum frá 11 – 17.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Hannu E. Olsen, leiðara á frítíðarskúlanum, fartlf. 771009. Skrivlig umsókn, við avritum av prógvum og ummælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23 január kl. 10. 00.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Frítíðarskúlan í Gøtu
Fyri oman Brúgv 3
FO – 513 Sýðrugøta

Bygdaráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

# Kunngerð

Tórshavnar býráð hevur í 2009 regluligan fund hesar hósdagar, kl. 18.00.

| | |
|---|---|
| 29. januar | 17. september |
| 19. februar | 8. oktober |
| 19. mars | 5. november |
| 30. apríl | 26. november |
| 28. mai | 17. desember |
| 25. juni | |

**Tórshavnar kommuna**

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**